# FCK meiri enn hálvkiksaði

**Tað endaði málleyst ímóti svenska Djurgården, og harvið verður tað torført hjá FCK at spæla seg til næsta umfarið í UEFA Cup**

EUROPA CUP

*Jóannes Hansen*

Tað royndist ikki so væl hjá FCK í UEFA Cup hóskvøldið, sum teir høvdu vónað og kanska eisini roknað við. Dysturin ímóti svenska høvuðsstaðarfelagnum, Djurgården, endaði málleysur. Harvið skal FCK skora mál um fjúrtan dagar, tá tað fer at verða spælt á Råsunda.

FCK hevði tríggjar ikki so lítlar møguleikar hóskvøldið. Nógv tann besta átti Zuma, tá hann úr fýra metrum royndi at fá returbóltin í opna málið, eftir at miðvallarin Thomas Røll hevði sent í tvørtræið. Málverjin lá flatur, men á ein ella annan hátt evnaði Zuma at senda omanfyri málið.

Zuma hevði í 2. hálvleiki ein stútara, sum eftir innlegg úr vinstru skuldi havt endað í málinum. Men bólturin støkk í jørðina og so uppum. Og so hevði Todi Jónsson, sum var við frá fyrsta bríksli og spældi ein stóran tíma, tveir møguleikar. Seint í 1. hálvleiki var hann akkurát ov aftarlaga, tá innlegg úr vinstru kom tætt framvið stólpanum, og í 2. hálvleiki hevði hann eitt rimmar langskot úr fimtan metrum, men svenski málverjin bjargaði.



*Sibusiso Zuma hevði størsta møguleikan í dystinum, tá hann bert hevði ein liggjandi málverja fyri sær, men onkursvegna fekk hann sent bóltin upp um málið*

Svenski FCK venjarin, Hans Backe, segði seg vera væl nøgdan við 0–0, og hann roknaði tað framvegis at vera rættuliga sannlíkt, at FCK um fjúrtan dagar fóru at verða samantaldi vinnarin. Serliga fegnaðist venjarin um, at tað enn eina ferð eydnaðist at halda tætt í verjuni.

18.152 áskoðarar hugdu at í Parkini. Ein partur av teimum vóru sviar. Tað spældi bara væl av, men sekstan áskoðarar endaðu í brummuni.

### Spældu væl

Svensku gestirnir vóru ikki komnir til Keypmannahavnar at standa fyri undirhaldinum. Men teir tóktust kortini væl upplagdir. Teir vóru sera stinnir í snarálopunum, og FCK menninir vóru hepnir, tá 20 ára gamli Kim Källström úr stórari fjarstøðu sendi bóltin í tvørtræið og so útaftur.

Umframt FCK vóru trý onnur donsk lið hóskvøldið við í Europa Cup kappingunum. FCM vann 1–0 á heimavølli ímóti Varteks úr Kroatia. OB tapti 2–0 á útivølli ímóti Celta Vigo úr Spania. Og so var tað mett at vera ein meiri enn hálv skandala, at Brøndby tapti 4–1 á útivølli ímóti Levski Sofia. Teir vóru rættuliga ørkimlaðir, og í síðstu løtu fekk landsliðsáleyparin, Peter Madsen, reyða kortið fyri at stúta ein av mótstøðumonnunum.

EB/Streymur-B36:

# Fótbóltslagið skal upp

**Bæði hjá EB/Streymi og hjá B36 tykist fótbóltshýrurin vera niðurgangandi, men tað ælta bæði tó at broyta um vikuskiftið**

UPPTAKT

*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at leikararnir hjá EB/Streymi onkuntíð hava verið meira eldhugaðir, enn teir eru í løtuni. Seinastu vikurnar hevur verið mest sum greitt, at liðið fer at enda sum nummar átta á stigatalvuni, og tó at hetta enn kann broytast skeiva vegin, so verður tað ikki mett serliga sannlíkt.

Tá so er, so fellur áhugin og intensiteturin í venjingunum oftani, og hetta hevur so eisini speglast aftur í avrikunum. Nú eru bara tríggir dystir eftir, og tað tykist, sum teir hjá EB/Streymi nú hava sett sær fyri, at teir í hvussu so er vilja enda árið ordiligani. Í øllum førum eru boðini undan vikuskiftinum, at sjálvt um B36 er ein stórur biti, so ætla heimamenninir so avgjørt at fáa nakað burturúr dystinum.

Til dystin hevur EB/-Streymur so at siga allar mans tøkar. Undantakið er Christian Carlsson, sum bert fekk 10 minuttir á vøllinum á Skála, áðrenn reyða kortið varð havt á lofti, og so er spurningurin, hvønn Trúgvi Mortensen setir á vøllin fyri hann. Ein møguleiki er Knút Vesturtún, sum júst er heimafturkomin, men møguliga er ein vika við venjing ikki nóg mikið hjá annars so dygga verjuleikaranum.



*Ronnie Samuelsen og liðfelagarnir í EB/Streymi skulu sunnudagin royna at fáa fótbóltslagið nakað upp, tá B36 kemur á vitjan á Mølini*

### Luftin farin

Hjá B36 tykist tað einamest, sum um luftin er farin úr leikarunum, eftir at teir fyri viku síðani settu stig til móti KÍ, tó at teir at enda skuldu vera fegnir um at fáa nakað sum helst.

At teir soleiðis mistu eitt stórt fet í stríðnum um heiðursmerkjuni hevur merkt venjingina hesa vikuna, og spurningurin er so, hvørt leikararnir megna at toga seg sjálvar nóg væl uppaftur, nú enn ein uppgáva stendur fyri framman.

Til dystin hesaferð eru so at siga allir mans tøkir. Einasta undantakið er helst Iulian Florescu, sum noyddist út við skaða móti KÍ, og so er spurningurin helst, hvørt tað verða Niels Joensen ella Kenneth Jacobsen, sum koma inn ístaðin. Í aðrar mátar tykjast allir mans at vera tøkir.

B68-VB:

# B68 skal finna sjálvsálitið

**Bæði hjá toftamonnum og vágbingum snýr tað seg nú bara um at koma sum frægast burturúr kappingarárinum, sum teir ongum kunnu røkka í**

UPPTAKT

*Jóannes Hansen*

Tá B68 sunnudagin fer á heimavøllin á Svangaskarði verður tað við nýggjum ábyrgdarmonnum. Kjartan Nesá og Ingolf Petersen hava nú venjingina um hendi, og teirra fyrsti lutur verður at seta spælararnar upp, so teir kunnu fáa meiri burturúr, enn teir hava fingið í teimum seks umførunum, sum eru spæld av seinna partinum av landskappingini í ár.

Frá og við 10. og til og við 15. umfarinum hevur B68 fingið tvey stig, teir hava skorað fimm mál, og trettan mál eru farin ígjøgnum.

– Sjálvandi hevur tað ikki verið hugaligt. Serliga ikki tá havt verður í huga, hvussu tað gekst í fyrru helvt av kappingini, tá vit vóru millum tey fremstu.



*Tað hevur roynst væl hjá VB á Toftum. Eitt nú í fjør, tá teir vunnu 4-1*

Tað staðfestir B68 liðformaðurin, Hans Fróði Hansen, sum er við aftur, eftir at hann var leikbannaður í Gøtu:

– Lagið hevur verið gott undir venjingunum í vikuni. Vit vóna inniliga, at vit fara at megna at venda gongdini. Tað hevði verið sera hugaligt hjá okkum øllum.

Hjá B68 eru allir spælararnir tøkir uttan Jan Petersen, sum hevur verið skaddur í fleiri vikur, og sum framvegis ikki er komin so mikið fyri seg, at hann kann spæla.

### Eitt sindur frægari

Í Vági eru teir – sum so nógva aðra staðni – farnir at troyttast av fótbóltsárinum. Teir hava síðani eina ferð í august vant tríggjar ferðir um vikuna. Undan summarsteðginum vandu teir fýra ferðir um vikuna.

Allir spælararnir hjá VB eru tøkir, nú teir fara á Svangaskarð. Hjá VB hevur tað ikki vignast serliga væl seinnapartin av kappingarárinum, men tað hevur hilnast betri enn hjá B68. Síðani í 10. umfarinum hevur VB fingið sjey stig.

Hagtølini siga, at tað ofta roynist væl hjá VB á Toftum, har teir ikki hava tapt síðani í 1998. Í landskappingardystinum í Vági fyrr í summar vann B68 2–1.



# KUNNGERÐ

**um matrikulering í Vestmanna**

Eftir § 38 í løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. verður farið undir eigindómsávísing fram við fjøruni niðan undir vegin frá Stígnum inn til Fossá.

Orsøkin til hesa eigindómsávísing er, at munalig avvik í fleiri førum eru millum matrikul, tingbók og tey veruligu eigindómsviðurskiftini í økinum, og verða tí allir eigarar og onnur, ið varða av ognum í økinum, boðaðir at møta.

Eigindómsávísingin byrjar týsdagin 8. oktober kl. 9. Byrjað verður við uttasta neystið í grótbrotinum. Arbeiðið verður gjørt samsvarandi § 3-11 í matrikuleringslógini.

Tá rættingarnar eru gjørdar, verða tær sendar Landsstýrinum, ið við almennari stevning leggur sak við Føroya rætt mót øllum og einum, ið hava mótmæli móti rættingunum, og at tær verða gjørdar í matriklinum og tingbókini.

Rættarmálið verður havt í rætti allar vanligar tingdagar, frá tí degi stevningin fyrstu ferð er lýst, og til stevnufreistin er farin.

Bygdarráðið skal velja tveir mans at hjálp Matrikulstovuni við at greiða eigindómsviðurskiftini.

**Matrikulstovan**
tann 20. september 2002

Øssur A. Midjord
matrikulstjóri


GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045



Gravsteinar,
kantsteinar og blómubeð
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Sosialurin - 311820
Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið





Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN


# Fimleikafelagið Støkk

**Mánadagin 23. september 2002 byrjar fimleikurin hjá Støkk endiliga aftur!**

Luttøkugjald fyri hvørja vetrarhálvu:

Foreldur og børn kr. 200,00
3.-7. flokk kr. 175,00
Vaksin kr. 250,00
Børn 5 ár – 2. flokk kr. 150,00
8.-10. flokk kr. 200,00
Úrvalslið kr. 50,00

*Høllin í Glyvra skúla*

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| 3. fl. Gentur<br>Kristina og Beinta<br>kl. 15.30-17.00 | Smágentur stórk.<br>Lív<br>kl. 15.30-17.00 | 2. fl. Gentur<br>Jenny og Karla Maria<br>kl. 15.30-16.30 | 4. fl. Gentur<br>Jónvá og Ann Mari<br>kl. 15.30-17.00 | 3.-5. fl. Dreingir<br>Áki og Gudmunur<br>kl. 13.30-15.00 |
| Gentur stórk.<br>Rannvá<br>kl. 17.00-18.30 | 1. fl. gentur<br>Eyðbritt og Ingun<br>kl. 17.00-18.00 | Børn 5-6 ár<br>Osla og Kirstin<br>kl. 15.30-18.00 | Pinkur stórk.<br>Lis<br>kl. 17.00-18.30 | Foreldur og børn<br>Mariann<br>kl. 15.00-16.30 |
| 7. fl. Gentur<br>Sigrun og Selma<br>kl. 18.30-20.00 | 6.-8. fl. Dreingir<br>Heri<br>kl. 18.00-19.30 | 1.-2. fl. Dreingir<br>Svend<br>kl. 18.00-19.00 | 6. fl. Gentur<br>Sarita og Rósa<br>kl. 18.30-20.00 | |
| | Motiónskvinnur<br>Jóhanna<br>kl. 19.30-20.30 | 5. fl. Gentur<br>Helga Súsanna<br>kl. 19.00-20.30 | Kvinnur<br>Eva<br>kl. 20.00-21.30 | |
| | Ungar kv. 17-25 ár<br>Dagbjørt<br>kl. 20.30-22.00 | 8.-10. fl. Gentur<br>Maria og Linda<br>kl. 20.30-22.00 | | |

**Reiðskap og Styrki venja í Eysturoyar Heilsølu hósdag kl. 20.00-21.30. Venjarar eru Ludvík og Johannes.**

**Úrvalsliðini í reiðskapi venja í Eysturoyar Heilsølu. Fimleikararnir fáa nærri boð frá venjarunum.**

**Stórkappingarliðini venja í ítróttarhøllini í Runavík hósdag:**

**Smágentur kl. 15.00-16.00**
**Gentur kl. 16.00-17.30**
**Kvinnur kl. 17.30-19.00**

# Hugskotskapping

Við hesum verður útskrivað hugskotskapping um felagsnavn til barnaansingarstovnin á Svangaskarði, umframt nøvn til Spælistovuna, Útibarnagarðin og Frítíðarskúlan.

1. virðisløn er 3.000,00 kr.
2. virðisløn er 2.000,00 kr.
3. virðisløn er 1.000,00 kr.

Nærri upplýsingar fáast frá Nes kommunu á tlf. 447586.

Nes kommuna skilir sær rætt til, frítt at velja millum tey innkomnu hugskotini, ella einki at taka.

Seinasta freist fyri at senda hugskotini inn, er fríggjadagin hin 18. okt. 2002 kl. 16.00.

**Nes kommuna**

# Gráur posi frá IRF

Hesa vikuna hevur hvørt húski í limakommununum fingið eina rullu við 26 gráum posum frá IRF.

Gráu posarnir eru ætlaðir til dagliga ruskið, sum skal brennast.

Ein gráur posi verður heintaður frá hvørjum húski um vikuna.

Húski við seks fólkum ella fleiri og húski við serligum tørvi hava rætt til tveir posar. Kommunustýrið boðar IRF frá hesum.

Posarnir eru fyri tíðarskeiðið frá og við viku 39 í 2002 til og við viku 12 í 2003.

Eykaposar vera at fáa til keyps í handlunum um stutta tíð.

Víst verður annars til IRF-kalendaran 2002 og heimasíðuna www.irf.fo

# Sethús í Runavík

Sethús við Gerðisvegin í Runavík til sølu um nóg høgt boð fæst.

**Tlf. 220772**


Sosialurin
www.sosialurin.fo